# VIÐTØKUR FYRI FORELDRARÁÐ

**§ 1. Endamál.**
Endamál foreldraráðsins er at fremja áhugamál foreldranna í samráð við leiðara og dagrøktina, vøggustovuna, barnagarðin, frítíðarskúlan ella ungdómshúsið og skal arbeiða fyri at styrkja um samstarvið ímillum heim, foreldur, stovnar og kommunu.
Foreldraráðið skal virka fyri trivnaði millum børn, foreldur, starvsfólk og stovnin.

**§ 2. Heiti.**
Foreldraráðið fyri (stovnur) í (navn á kommunu) .

**§ 3. Foreldraráðslimir.**
Í ráðið kunnu veljast øll, sum hava børn í stovninum. Undantikin eru starvsfólk, sum hava børn á dagstovni, í dagrøkt og frítíðarskúla..

**§ 4. Atkvøðurættur.**
Foreldur ella avvarðandi hava eina atkvøðu hvør.

**§ 5. Ráðið.**
Foreldraráðið er samansett av trimum ella fimm limum, sum foreldrafundurin ger av. Ávikavist verða tveir og tríggir limir valdir í líkatals ári og ávikavist verða ein og tveir limir valdir í ólíkatals ári. Tiltakslimur verður valdur fyri hvønn nevndarlim sær. Ráðið verður valt við vanligum atkvøðumeiriluta millum møttu foreldrini ella avvarðandi.
Fyri hvønn ráðslim verður valdur ein varalimur eftir somu skipan sum ráðsval.

Fer barn hjá ráðslimi úr stovninum, tekur varalimurin sæti í ráðnum.

Ráðið skipar seg sjálvt við formanni, næstformanni og skrivara.

Skrivarin skrivar fundarfrásøgn, sum verður undirskrivað av ráðslimunum eftir fundin ella á fyrstkomandi ráðsfundi.

**§ 6. Fundir.**
Foreldraráðið kemur saman minst einaferð um ársfjórðingin og áliggur tá formanninum at kalla ráðið saman.

**§ 7. Foreldrafundur.**
Foreldrafundur verður hildin á vári eina ferð um árið við hesi dagsskrá:

1. Frásøgn frá stovnsleiðaranum frá farna ári
2. Frásøgn frá foreldraráðnum
3. Val av limum og varalimum til foreldraráðið
4. Viðger av innkomnum málum.
5. Ymist.

Uppskot, sum skulu viðgerast á foreldrafundi, skulu skrivliga vera ráðsformanninum í hendi seinast 14 dagar fyri fundin.
Foreldrafundurin er viðtøkuførur, tá minst helvtin av barnatalinum er umboðað.

Foreldrafundur verður annars hildin, tá helvtin av ráðslimunum, leiðarin, minst 5 av foreldrunum ella kommunan ynskja tað.

**§ 8. Samráðingar.**
Ráðið er lið millum foreldur, stovnsleiðara og kommununa.

**§ 9. Ábyrgd limanna.**
Hvør limur í ráðnum hevur tagnarskyldu um øll viðkomandi viðurskifti sum hann fær kunnleika um á ráðsfundi ella á annan hátt. Tagnarskyldan er eisini galdandi eftir at limur er farin úr ráðnum.
Hvør ráðslimur skal undirskriva eina váttan um tagnarskyldu.

Viðtøkurnar, sum arbeiðsbólkurin hevur tilevnað, eru vegleiðandi og kunnu broytast og tillagast eftir tørvi.
Arbeiðsbólkurin hevur tikið støði út frá, at foreldraráðini eru ráðgevandi og skulu fremja áhugamál foreldranna í samráð við leiðaran á viðkomandi stovni. Tað liggur í hesum, at foreldraráðið hevur eitt gott samstarv við foreldur, starvsfólk og leiðarar og røkir áhugamál foreldranna í samráð við hesi fyri at skapa trivnað millum børn, foreldur, starvsfólk og stovnin.
Námsfrøðiliga og rakstrarliga innihaldið liggur undir ábyrgd stovnsleiðarans.

Vónandi verða hesar viðtøkur ein góð hjálp hjá øllum, sum á ein hvønn hátt hava tilknýti til ein stovn.

Arbeiðsbólkurin vil fegin hoyra aftur um eitthvørt uppskot til betran av viðtøkunum og sum annars kunnu brúkast til ein virkisætlan fyri stovnin.

Viðtøkurnar eru góðkendar á býráðsfundi tann 26. november 2002, § 7 er broytt tann 05. juni 2003 og § 5 tann 27. november 2003.

Fuglafjørður, tann 03. desember 2003

## Vegna Fuglafjarðar kommunu

Sigurð S. Simonsen
Borgarstjóri

// Jákup Frants Larsen
býráðsskrivari